# Ongantíð verið nakar shopaholic





*Tann altíð so snøgga landsstýriskvinnan nýtir smyrsl av gomlum vana. Smyrslið skal vera av merkinum L'oreal, og í smyrslpunginum er varrastiftin eitt krav.*

forkelan, sum gevur nógv størri vælveru enn hárfríðkan, klædna- og skógvakeyp. Tað er renning.

– Eg plagdi at renna hvønn dag. Nú røkkur tíðin ikki til meir enn 1-2 ferðir um vikuna. Men eg elski at renna. Eg renni altíð á vegnum, tí eg vil síggja umhvørvið, eg renni í. Eg eri gamal svimjari, og tá eg gavst við at svimja á høgum støði, byrjaði eg í staðin at renna. Tá førdi eg dagbók yvir hvat eg át, og hvussu nógv eg vandi. Tá eg so gavst við at svimja, helt eg fram við at eta, og tá tók eg 13 kilo uppá bara innan fyri ein mánað.

## Sláimaskinuna fram um dustsúgvaran

Annika Olsen misti her fyri sína vaskikonu. Og henni er saknur í.

– Tað er keðiligt, onga vaskikonu at hava. Eg havi als onga tíð til at gera reint, og eg raðfesti tað heldur ikki. Eg haldi kortini, at tað gott kann vera hugnaligt at ganga runt við einum klúti, men skal eg velja millum sláimaskinuna og dustsúgvaran, so velji eg nógv heldur sláimaskinuna, tí so eg sleppi at vera uttandura. Eg raðfesti nógv heldur børnini framum at gera reint. Men at fáa eina nýggja vaskikonu skal eisini raðfestast, sigur hon við einum smíli.

Í túninum hjá Anniku Olsen standa tveir bilar – tað er fullkomiliga óneyðugt, metir hon.

– Vit hava als ikki tørv á tveimum bilum. So slettis ikki tá mann kann koyra ókeypis við býarbussinum, sum eg geri nógv brúk av. Men vit hava altso ein BMW og ein Renault. Tað hevur sínar orsøkir, at vit hava ein BMW, sum er ein diesel bilur. Hann varð keyptur, tá eg undirvísti á Kambsdali. Eg varð tá við í eini ferðsluvanlukku, og eri sannførd um, at var tað ikki fyri góða bilin, hevði eg ikki verið á lívi í dag, sigur hon álvarsliga.

Í sínum lestrarárum í Odense hevði Annika Olsen ein studentabil, sum hon rópar tað. Ein lítlan bil at koyra aftur og fram við. Í dag sær valið av bilum eitt sindur øðrvísi út.

– Tá hugsaði eg als ikki um nakra trygd við bilinum. Í dag hugsi eg nógv um dreingirnar, og at teir skulu vera tryggir í bilinum. Tí havi eg góðar bilstólar til teir, sum skulu vera av góðari góðsku. So góðar bilstólar vil eg fegin gjalda fyri.

